# Nógv fyri framman

**Tey eldru úr Tilhaldinum hugnaðu sær óført týsmorgunin, tá sangløta var á skránni. Fyri hesi eldru liggur eisini nógv fyri framman. Tey fáa til dømis forkunnuga vitjan úr Aberdeen síðst í september mánaði**

ELDRATILHALD
*Henny Olsen*

Hvønn týsmorgun klokkan 9.00 møta um 30- 40 pensiónistar í Tilhaldinum. Tá hava tey nevniliga sangløtu. Tey syngja sangir, sum vanligir eru at syngja til samkomu, men tey hava eisini savnað sær trý serlig hefti, har tey hava valt teir best dámdu sangirnar burturúr. Hetta eru sangir, sum til dagliga verða roknaðir sum gloymdir, men her eru teir so sanniliga livandi. Tey sita og hugna óført sær við bindigreiðum og klaverspælið. Ikki minni enn 5 pianistar eru, millum annað Eyðun Sørensen, sum var sanglærari í Hoydølum. Hesir pianistar eru sera ymiskir, og spæla ymiskar sangir, so tey eldru fáa alt við.

Men ikki verður skipað fyri bert sangløtum. Mikumorgunin vóru tey í Nólsoy, har tey skuldu hyggja seg um. Í gjár vóru tey í Fuglafirði, har tey hugdu at "Opinberingini" við Lone Hertz. Og 22. september eru øll tey eldru á veg til Hetlands.



Týsmorgunin var skipað fyri sangløtu í Tilhaldinum. Tey eldru hugnaðu sær óført
Mynd: Jens Kristian Vang

### Vitjan úr Aberdeen

Síðst í september mánaði fáa tey eina forkunnuga vitjan úr Aberdeen. Gestirnir eru eldri fólk og ein av teimum, ið koma við, er borgarstjórin Lord Provost. Í sambandi við hesa vitjan, verður skipað fyri eldraviku tá. Tá fer mangt og hvat at henda. Millum annað fara tey eldru úr bæði Føroyum og Skotlandi at úvekslað erfaringar innan list og so víðari.

Eisini kemur Knút Olsen við børnum, ið ganga í skúla uppiá Tilhaldinum, at syngja fyri teimum eldru. So hesi eldru hava heilt sikkurt okkurt at gleða seg til.

Ikki man verða so galið at verða gamal.



# Livandi verkstaðir í pakkhúsi

**Faroese Art & Craft fer í næstu viku at skipa fyri spennandi søluframsýning. Við vera nógv listarfólk og nógvar ymiskar listagreinar, so sum klædnalist, leirlist og grótlist**

LIST
*Henny Olsen*

Í døgunum 14. til 21. september skipar Faroese Art & Craft fyri søluframsýning av føroyskum handverki og listahandverki í Müllers pakkhúsi í Havn. Høvið verður hjá gestum og áskoðarum at síggja og keypa mangt og hvat.

Nógvar ymiskar listargreinar verða at síggja. Har verður víst ymiskt innan klædnalist so sum binding og design. Eisini verður ymiskt innan trælist, jarnsmíð, glarsmíð/ smykkur og annað.

Framsýningin byrjar við, at Bjarni Djurholm, landstýrismaður, setur hana. Síðan verða nógvar spennandi hendingar á skránni. Persónar, sum til dagliga hava við listina at gera, koma at hava fyrilestrar og hugleiðingar. Til dømis kemur Ása Hátún at hava fyrilestur mikudagin og Frits Johannesen at hava hugleiðingar leygardagin.

Við til listini hoyrir tónleikur til, og tað verður tað eisini nógv av. Kristian Blak fer at framføra mánadagin og týsdagin, Déjá Vu kemur at spæla hósdagin, Niels Midjord og P.J. Eliasen fara at syngja leygardagin og kvinnukórið Suð kemur at syngja á síðsta degnum, sum er sunnudagin tann 21. september. Eisini verður café við heimabaksti.

Heilt nógv listarfólk verða. Yvir 50 til samans. So har verða óivað nógvar hugnaligar samrøður og nógvar ábendingar givnar.

Almenningurin er vælkomin at hyggja at sýningini frá 14. til 21 september. Opið verður hvønn dag frá klokkan 14.00 til 20.00, tó fríggjadag frá klokkan 14.00 til 22.00 og leygardag frá klokkan 10.00 til 22.00. Atgongdin kostar 50 krónur fyri vaksin og 20 krónur fyri børn.

# Alt frá akryl til hálv-skulpturar

**Hósdagin lat upp ein sera spennandi listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Arngerð Joensen, ið sýnir fram, sigur, at henni dámar sera væl at eksperimentera, og hetta sæst eisini aftur á málningunum**

LIST
*Henny Olsen*



*Arngerð Joensen, ið er ein sera eksperimenterandi listarkvinna, hevur í løtuni eina framsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hósdagin tann 11. september læt ein listaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík. Listarkvinnan, ið hevur sýningina, er Arngerð Joensen. Arngerð sigur, at henni dámar væl at eksperimentera, og hetta sæst eisini aftur á listini. Hennara málningar eru sera serligir, og sjálv sigur hon, at nakrir eru millumting millum málningar og skulpturar. Hon hevur í einum málningi koyrt sand í, so at hon fekk málningin at standa út eftir.

Evni í hesi framsýning er fossar og grót. Men eisini hevur hon málað Havnar kirkju, mannakroppin og Vaglið, bara fyri at siga okkurt. Arngerð sigur, at hon hevur gjørt alt frá byrjan av. Grundað sjálv og tílíkt. Hon sigur eisini, at allir málningarnir eru málaðir í fleiri løgum. Tann størsti málningurin er málaður í heili fimm løgum. Hon sigur, at sjáldan er hon nøgd við málning, sum bert er í einum lagið, og so blívur hon bara við at mála útyvir.

Arngerð er útlærdur innandura-arkitektur, men seinni fór hon undir evningslæraraútbúgving. Hon hevur eisini gingið á Århus kunstakademie og verið 6 ferðir niðri á Holbæk kunstskole. Eisini hevur hon í Føroyum gingið á skeiðum, har hon hevur lært seg alt frá tekning til leir. So tað má sigast, at fremmand innan listarheimin er hon als ikki.

Arngerð hevur eitt stórt hugflog. Sambært henni kann nógv nýtast í listini. Hon hevur til ein málning, til dømis tikið hár frá ommudóttrini og mála tað uppá løriftrið. Men fyri at byggja hugflogið upp, er hon á skeiði hvørt ár. Hon vil eisini læra nýtt, og sigur, at hetta er ein góður møguleiki til tað.

Listarframsýningin hjá Arngerð Joensen í Smiðjuni í Lítluvík læt upp hósdagin og verður opin til sunnudagin.



# Sparikassadeild í Miðvági letur upp

TÍÐINDASKRIV



Mánadagin 15. september letur um- og útbygda deildin hjá Føroya Sparikassa í Miðvági upp. Í tí sambandi verður móttøka í nýggju hølunum seinnapartin mánadagin.

Millum klokkan 15 og 17 mánadagin verður móttøka á deildini hjá Føroya Sparikassa í Miðvági í sambandi við, at bygningurin verður tikin í nýtslu.

Arkitektavirkið v. Árna Winther hevur teknað bygningin av nýggjum. Jónfinn á Plógv hevur havt høvuðsentreprisuna upp á arbeiðið, og Leif Mohr hevur staðið fyri el-arbeiðnum.

"Hetta man vera mest umtalaði bygningur í Vágum í hesum døgum. Tað vísir seg, at tey flestu her vesturi hava eina meining um húsið, nú tað arkitektoniska úttrykkið er komið fram. Tey eldru eru kanska eitt sindur skeptisk, men tey yngru eru sum heild hugtikin av bygninginum, sum bjóðar landslagnum og bygdini av. Bygningurin er vakur, øðrvísi, væl gjøgnumhugsaður innan og ergonomiskt er hann góður fyri starvsfólkini. Nú hava vit góðar arbeiðsumstøður", sigur Sjúrður Poulsen, deildarleiðari hjá Sparikassanum í Miðvági.

Í lýsingum í bløðunum um vikuskiftið bjóðar Sparikassin kundum og samstarvsfeløgum inn á gólvið til móttøku í um- og útbygdu deildini í Miðvági. Móttøkan er millum kl. 15.00 og 17.00 Deildin letur annars upp klokkan 12 mánadagin.

# Gevið kroppinum eitt vikuskifti

TÍÐINDASKRIV

Putte Hassenkam, avspenningspetagogur, kemur til Føroya, at halda eitt skeið fyri fimleikalærarum, fitnessinstruktørum og øðrum við serligum áhuga fyri at nýta tónleik til fimleik og avspenning.

Skeiðið verður hildið í Hoyvíkar skúla leygardagin 20 september kl. 13-17 og sunnudagin 21 september kl. 13.30 - 17.30

Margretha Hassenkam, kallað "Putten", er hálvur sørvingur, og hevur verið fimleika instruktørur í 30 ár í Danmark. Hon er ótrúlig sigst.

Hon kemur til Føroya at halda skeið í "bevægelse og afspænding". Skeiðið er inspiratións-skeið ætlað fitnessinstruktørum, fimleikalærarum og kvinnum, ið hava serligan áhuga at mýkja kroppin.

Luttakaratalið er avmarkað til í mesta lagi 16 luttakarar. Kostnaður kr. 750,00

Tilmelding: PutteHassenkam@hotmail.com ella á tlf. 316369 ella 216369 eftir kl. 16

# Nú kvøldini gerast longri, verður aftur farið at svinga…

TÍÐINDASKRIV
*frá Dansifrøi*



Eins og undanfarnu ár skipar Dansifrøi fyri dansifrálæru í gomlum sum nýggjum dansum. Sí lýsing aðrastaðni í blaðnum.

Seinni í vetur verður eisini skipað fyri einum vikuskiftisskeiði í eingilskum dansi, sum er fyri øll dansiáhugað. Lýst verður nærri um hetta skeiðið.

Í endamálsgreinini í lógini hjá Dansifrøi stendur, at felagið er stovnað við tí í huga »at nøra og varðveita áhugan fyri gomlum dansum«.

Tað liggur nær at hugsa sær, at tað at dansa gamlar dansir er gamaldags. Men soeliðis munnu tey yvir 2500 fólkini, sum í eitt styttri ella longri tíðarskeið hava verið limir í Dansifrøi, neyvan hava hugsað.

Dansifrøi hugsar eisini um børnini og tey ungu og skipar tí eisini fyri dansifrálæru í »nýggjum« dansi.

Hetta er tó uttan fyri limaskipan hjá felagnum, og sleppa sjálvsagt tey ungu ikki við til veitslurnar hjá felagnum.

At dansa er stuttligt og gevur góða rørslu, tað er eisini ein góður máti at koma burtur frá tí dagliga arbeiðsresinum …

Dansifrøi er eisini annað enn dansur! Tann sosiala samveran er eisini ein týðandi partur av felagsskapinum.

Umleið eina ferð um mánaðin hvørt vetrarhálvár verður skipað fyri hugnakvøldi við dansi. Nakrar fastar veitslur eru eisini, tað stóra kalda borðið, jólahugni/jólatræ saman við børnum, ársveitslan og avdansiveitslan.

Á hvørjum ári verður skipað fyri útferð til okkurt pláss í Føroyum. Fleiri uttanlandsferðir hava verið, og hava dansarar aðrastaðni frá eisini verið á vitjan.

Dansifrøi er eitt áhugafelag. Tað vil siga, at alt, sum fer fram í felagnum, er eitt úrslit av tí virksemi, ið nevndin skipar fyri, og teirri undirtøku, sum limirnir vísa felagnum.

Dansiárið hjá felagnum byrjar 22. sept. 2003 og endar við avdansiveitslu 25. mars 2004.

# Mariusystir Josuana á vitjan í Føroyum frá 12.-24. sept.




MARIASYSTIR VITJAR
*Tíðindaskriv*

Mariasystir Josuana frá Evangelisku Mariusystrunum í Darmstadt vitjar í Føroyum. Hetta er sættu ferð, hon kemur higar. Eitt nú fer hon at hava møti í KFUM í Havn, í missiónshúsinum í Vestmanna, á Sandi, í Suðuroy og í Vágum.

Mariasystir Josuana er fødd og uppvaskin í Noregi, men arbeiðir nú í høvduðsmistøð teirra í Týsklandi. Tær gott 300 mariusystrarnar eru úr 23 ymiskum longum, og tær arbeiða eisini í 12 miðstøðum víða um heim.

**Høvuðsuppgávan**
Høvuðsuppgáva teirra er missión gjøgnum bøkur, bókamerki við kristiligum teksti, traktatir o.l. og eisini video. Stórur dentur verður lagdur á at geva konkreta hjálp til teirra, sum ynskja at liva eitt lív í eftirfylgjan av Jesusi. „Evangleiecentrene" í Noregi (heim fyri fyrrverandi rúsmisnýtarar) brúka til dømis nógv litteratur frá Mariusystrunum. Heilt nógvar bøkur og prentlunir fara eisini so javnan til Asiu, Afriku og til lond, har ikki er loyvt at boða Guðs orð.

**Eyðkendu bókamerkini**
Eyðkendu bókamerkini (sí hjálongdu mynd) fáast nbú á 93 ymsum málum. Mong dømi eru um, at hesir stuttu teksir hava veirð fólki til hjálpar á neyðarstund.

**Verður latið ókeypis**
Alt verður latið ókeypis, (tó ikki til bókhandlar, sum mugu keypa sínar bøkur). Soleiðis hava tær arbeitt í nógv, nógv ár. Alt. Sum krevst til prenting, at senda við, teldur, pappír, frímerki o.s.fr., hava tær til higartil fingið sum gávur. Tær biðja Gud um tað, sum teimum tørvar, og Gud svarar – í sínum tíma. Somuleiðis er við matvørum, klæðum og øllum til lívsins uppihald. Gud minnir fólk á at geva.

**Hvat er loyndarmálið**
Londarmálið aftanfyri hesi nógvu bønarsvarini er, at einki má vera, sum kann forða fyri, at Gud kann vælsigna. Merkja tær, at bønarsvarið ikki kemur, so rannsaka tær seg sjálva, eyðmýkja seg inn fyri Gudi og biðja um fyrigeving. Hetta er gongda leiðin hvørja ferð. Gud vælsignar og gevur. Við at liva á hendan hátt, ynskja tær at vísa, at Gud hoyrir hvørja bøn.

Ljóðar hetta áhugavert, so hevur Mariasystir Josuana fleiri møtir hesar dagarmar.

Øll eru vælkomin at vera við. Møtini verða lýst í bløðunum.

Ynskjast fleiri upplýsingar, so ring á tlf. 314740, 456030 ella 511614